gult8 cyan8 magenta8 svart8



## DAGSINS MEINING

# At fara eftir manninum heldur enn bóltinum

Vit hava seinastu tíðina verið vitni til, at samgongulimir hava roynt at køvt ein fakligan debatt um føroyska búskapin í samband við fullveldisætlan landsstýrisins.

Kári Petersen búskaparfrøðingur legði fram nakrar útrokningar, ið vóru sera líkar teimum, ið landsstýrið hevur lagt fram, men við millum annað tí muni, at hansara útrokningar vóru eitt sindur meira konservativar viðvíkjandi vøkstri. Tá talan er um Føroya framtíð, so er ivaleyst betur at undirmeta inntøkur enn at yvirmeta tær.

Nú kundi man kanska væntað ein fakligan debatt um fortreytir fyri vøkstur í føroyska búskapinum í tráð við gyltu orð Tjóðveldisfloksins um at hvør steinur skal vendast o.s.fr., men nei! Landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum tveitti seg - sum ein optimistjolla í ein tíggjumannafarsróður - út í tað, ið átti at verið eitt búskaparligt orðaskifti. Hann borðreiddi við nøkrum ókeypis hugleiðingum um rokniark, ið ivaleyst ikki eru meira enn tað sama verdar, og kom til ta niðurstøðu, at íkastið hjá Kára Petersen var politiskt.

Harmiligt er, at íkast, ið ditta sær at seta spurnartekin við búskaparliga grundarlagið hjá landsstýrinum pr definitión eru partapolitisk. Hetta minnir eisini ikki sørt um afturvendandi úttalilsini hjá formanninum í Tjóðveldinum um, at alt tað hinir gera og siga er partapolitikkur. Enn meira harmiligt er, at persónarnir, ið ditta sær at koma við einari fakligari meining verða viðgjørdir á einum støði, ið als ikki hoyrir heima í einari fakligari debatt. Tað hevur einki við vøkstur í føroyska búskapinum at gera, um onkur persónur hevur stillað upp til løgtingsval fyri onkran flokk fyri mongum árum síðani ella hevur røkt okkurt álitisstarv í umsitingini. Fullveldisfortalarar áttu heldur at nýtt orku uppá at fortalt fyri fólki, hvar hesin í heimshøpi einastandandi búskaparvøksturin skal koma frá, heldur enn at fara eftir monnunum, ið ditta sær at seta spurningar við ætlan teirra. Vit minnast, hvussu ein búskaparfrøðingur í samband við Hvítubók bleiv hongdur út av varaløgmanni, tí hann ikki akkurát sang úr sanghefti Tjóðveldisfloksins viðvíkjandi búskaparútlitum.

Hevði tað ikki verið skilagott hjá eitt nú einum yrkisfelag sum Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum at skipa fyri einum fakligum kjaki um føroyskan búskaparvøkstur, uttan at luttakarnir nýttust at verða bangnir fyri at verða viðgjørdir persónliga, politiskt, trúarmessiga ella á annan hátt, og ikki at forgloyma uttan at varaløgmaður fer at varpa framløguratur hjá hesum fólki um allar geilar.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tað verður nógv verri!

**Birgir Mohr**
*Sandi*



Skúlamálið er bert ein avleiðing – og hetta er bert byrjanin.

Nógv rok hevur verið í fjølmiðlunum um Vestmanna skúla og fundin, sum leiðslan har hevði við mentamálaráðharran. Hetta hevur vakt flestu skúlaleiðslurnar kring landið – eisini tey loysingarsinnaðu fólkini innan skúlaleiðslurnar – at gera vart við sína ónøgd. Og tey hava jú so púra rætt.

Politikkurin er skeivur – grundleggjandi skeivur – og hettar má broytast.

Men mær tykist, sum mest verður fokuserað upp á framferðarháttin hjá mentamálaráðharranum? Tað er møguligt at hesin ikki er í lagi, men málið er bert ein av nógvu avleiðingunum av verandi og komandi loysingarpolitikkinum hjá Tjóðveldisflokkinum. Og tí væl meira álvarsligt.

Nóg mikið skuldi verið av peningi í Føroyum undir hákonjunkturinum til, at vit kunnu játta fólkaskúlanum – grundstøði undir allari mentan, menning og endurnýggjan í fólki okkara – sín grundtørv.

Men nei, vælferðarsamfelagið skal skerjast, tí vit skulu spara upp til fullveldið og loysing. Tað er orsøkin til, at aðaløking í føroyska samfelagnum í dag – undir hákonjunkturinum – sum almannamál, heilsumál, skúlamál, eftirlønarmál o.m.a. ikki fáa tær neyðugu játtaninar.

Og tað var eisini ein av orsøkunum til, at vit høvdu eitt nú liðugt, men lemjandi verkfall, tí vit sigast ikki at hava ráð til at geva okkara arbeiðsfólki í m.a. flakavinnuni – høvuðsvinnu okkara og útflutningsvinna burturav – rímilig kor at virka undir og lønarkor at liva av. Og tann nú fráboðaði politikkurin sigur okkum: Tað verður helst verri enn!

Vit hava higartil bert merkt byrjanina av avleiðingunum, tá alt skal sparast til frama fyri fullveldið og loysing skjótast gjørligt.

Prísurin verður, um Tjóðveldisflokkurin fær sín vilja, at vælferðarsamfelagið syndrast. Og so at pástanda, at hesin politikkur, sum nú fær heitið: Kenslupolitikkur uttan ábyrgd, eisnki skal koma at kosta okkum føroyingum, tað er at siga ósatt fyri fólkinum.

Onkur nevnir fólkaskúlan: grundstøðið undir (eisini) fullveldinum. Og tá Tjóðveldisflokkurin ikki skilir týdningin av fólkaskúlanum, ja so haltar tað helst eisini á øðrum økjum við at stýra samfelagnum? Nei, trupulleikin eitur ikki bert Torbjørn – hann skal umsita lógirnar, sum Løgtingið viðtók.

Tann politikkur, sum skal førast í ríkisrættarspurninginum – tjóðskaparmálinum kann ikki førast eftir tjóðveldisleisti. Tað hava seinastu trý árini prógvað. Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vaðaðu ov langt út, og hava nú roynt í seinastuni at grynna inn aftur, men nógv er oyðilagt.

Ein nógv meira varin, hóvligur, langsiktaður og realistiskur politikkur á hesum økinum er kravdur. Ein politikkur, sum megin-parturin av Føroya fólki stendur aftan fyri. Bert tá náa vit málinum uttan lemjandi kostnaðin í livistøði. Missa vit vælferðarsamfelagið – tað persónliga frælsi, tá verður kostnaðurin hjá okkum føroyingum ov høgur at gjalda. Skúlin er bert eitt dømi av mongum herum í dag.

Okkum tørvar ein nýggjan politikk.

# Nær verður Teistin settur í sigling?

**Marjus Dam,**
*løgtingsmaður*



Løgtingið samtykti, at nýggj Sandoyarferja skuldi byggjast – fyri at SIGLA til Sandoynna.

Sera beiskt man vera hjá mongum sandoyingi at síggja, hvussu oyggin verður vanrøkt. Eitt skip, ið siglir seinni enn Tróndur, røkir nú hesa farleiðina. Orsøkin er tann einfalda, at loysingarministararnir við løgmanni á odda ikki megna at gera eina einastu avtalu við nakað manningarfelag. Vit vóru fleiri, ið óttaðust, at Teistin kom at verða næsti Brimil. Tíverri fingu vit rætt. Orsøkin er, at peningur skal samlast til loysingina.

Hetta vanlukkumál ger somuleiðis, at tingmenninir í oynni, ið bæði eiga løgmann og fíggjarmálaráðharra kunnu tykjast at hava fingið munnkurv.

Tí teimum hoyrist púrt onki frá.

Nokti SAM keipláss í Skopun!

Eftir míni hugsan eiga tit at nokta at SAM keipláss í Skopun frá 10 juni.

Tað vil leggja eitt trýst á landsstýrið, soleiðis at ein loysn verður funnin.

Um Landstýrið ikki megnar at fá eina loysn á hesum máli, so eigur tað at fáa fylgjur fyri avvarðandi landstýrismann/menn.

Tí Teistin skal í sigling – NÚ – BEINANVEGIN.

Men heldur ikki hetta einfalda mál tykjast teir førir at finna eina loysn á – eins og á so mongum øðrum økjum. Hví royna teir ikki at loysa tey einføldu málini. Tí tey stóru megna teir so ikki at loysa. Har eru teir dumpaðir.

# Tøkk til Føroya Tele

**Atli S. Justinussen**
*Árnafjørður*

Eg vil við hesum takka Føroya Tele fyri at tit nú hava útbygt GSM, soleiðis at vit nú eisini kunnu nýta okkara GSM telefon í heimbygdini.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.


gult9 cyan9 magenta9 svart9



# 13 nýggir motorpassarar

ÚTBÚGVING
*Eirikur Lindenskov*

Fríggjadagin fingu 13 mans prógv fyri at hava lokið dugnaskapsútbúgving í motorpassing.

Tað er Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli, sum stendur fyri hesi útbúgvingini, sum fer fram á Maskinskúlanum.

Hóast hetta er útbúgving undir kvøldskúlaskipanini, so er hetta útbugving við rættindum, tí hesir menn kunnu nú passa motorar við eini framtøkumegi upp til 678 HK í heimasigling, og tað er innan fyri 200 fjórðingar.



*Teir 13, sum fríggjadagin fingu prógv í motorpassing saman við lærarum. Teir, sum fingu prógvini eru í bókstavarøð: Bent Berg, Sofus Borðoy, Bergur Clementsen, Jákup Enni, Sámal Hansen, Jákup Heygsá, Volmar Højgaard, Bergur Magnussen, Magnus Magnussen, Sten Juul Pedersen, Niels Petersen, Finnur Rubeksen og Gunnlaugur Sighvatsson*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Fólkafundurin í Stóru Dímun avlýstur

**Vegna vanda fyri omanlopi er fólkafundurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Dímun fluttur út í Koltur**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*

Fólkafundurin, sum Tjóðveldisflokkurin ætlaði at skipa fyri í Stóru Dímun, er avlýstur.

Orsøkin er, at Óla Jákup úr Dímun, bóndi, av trygdaráðum hevur mælt frá at tiltakið verður framt. Ein kneysi í uppgongdini stendur til at loypa, og vandi er fyri, at hann loypur um nógv fólk koma upp ígjøgnum uppgongdina.

Óla Jákup hevur júst kannað viðurskiftini, og hann hevur varnast, at rivur eru komnar í bergið.

Við útvarpið segði Dímunarbóndin, at um eini 100 fólk eru í uppgongdini í senn, so kann ljóðið frá teimum fáa kneysan at loypa. Um bert fá fólk eru har, er vandin ikki so stórur, tí tá kunnu øll koma upp samstundis. Tað ber ikki til, um talan er um eini 100 fólk, segði Óla Jákup úr Dímun.

Fyrireikararnir hava tí gjørt av at avlýsa tiltakið, og í staðin verður farið út í Koltur hendan sunnudagin, sigur Ronnie Thomassen, skrivari Tjóðveldisfloksins.

# Pleygarar 12% í lønarhækking

SÁTTMÁLA-SAMRÁÐINGAR
*Eirikur Lindenskov*

Føroya Psykiatrifelag og Fíggjarmálatýrið hava gjørt nýggja sáttmála, sum gevur limum felagsins 12% í miðal í lønarhækking í sáttmálaskeiðnum. Sáttmáli er gjørdur, sum hevur gildi fram til 1. oktober 2003, t. e. tvey ár og sjey mánaðir.

Grundlønin hjá limunum í Psykiatrifelagnum hækkar við trimum prosentum 1. mars í ár, fýra prosentum 1. mars næsta ár og aftur við trimum prosentum 1. mars 2003.

1. mars 2001 verða sáttmálaviðbøturnar lagdar aftur at grundlønini. Ein útbúgvin pleygari fær eitt lønarstig aftur at endalønini, og harumframt eru gjørdar smærri broytingar í sjálvum sáttmálatekstinum.

Fíggjarmálastýrið og Psykiatrifelagið hava eisini gjørt avtalu um tiltøk at styrkja førleikamenning, eldrapolitikk, familjupolitikk og javnstøðu.

– Her er dentur lagdur á ein aktivan starfsfólkapolitikk, ið skapar grundarlag fyri góðum trivnaðar- og menningarmøguleikum hjá almennum starvsfólki og sum leggur dent á sambandið millum arbeiðslív og onnur lívsvirði, sigur Fíggjarmálastýrið.

## VIÐMERKINGAR

# Reisið Tróndi standmynd



**A. Guttormur Djurhuus**

Eingin er fullspottaður fyrr enn hann spottar seg sjálvan. so sigur gamalt orðatak og helst er nakað um tað.

Nú skal standmynd, nei tríggjar standmyndir, reisast til minnis um Sigmund Brestisson. Til minnis um henda niðingsmann sum sveik sítt land og gjørdi Føroyar til norskt skattland. Legði Føroyar undir norsku krónuna og settist sjálvur sum uppsitari fyri norska kongsveldið. Hann skal heiðrast, ikki við einari, men við trimum standmyndum.

Tað verður sagt at hann skal heiðrast við øllum hesum standmyndum afturfyri at hann kristnaði Føroyar, fyri túsund árum síðani. Eftir boðum úr Noregi. Helst kristnaði hann ikki eina einastu sál her á klettum, men noyddi fleiri at siga seg at hava tikið við kristnari trúgv. Tí annars tók hann lívið av teimum. Hvat var annað at gera enn at taka við nýggju trúnni og tiggja lív? Ikki var annað val.

Frammanundan hevði hann tikið politiska frælsið, sum tó helst bert var valafólki unnt, frá teimum, og nú tók hann so eisini trúarfrælsið frá fólkinum. Gerst tú kristin av at verða noyddur at frásvørja tær heidnari trúgv og játta tína trúgv á hvítakrist? Ikki haldi eg tað.

Ikki kann sigast at maður sum fer fram á slíkan hátt er kristin. Og hvussu kann maður sum ikki er kristin sjálvur kristna nakran? Hesin maður traðkaði á alt sum frælsi eitur, politiskt og átrúnaðarligt og var løntur umboðsmaður fyri útlendskt vald. Tað er hvat føroyingasøga sigur okkum. Og hon er skrivað av teimum sum vunnu. Tað er hon altíð. Teir mála sjálvandi eftir teirra tykki, og sum teir rætt halda vera, eina ljósa mynd av Sigmundi og hansara monnum og eina døkka mynd av Tróndi og hansara monnum.

Útlendska valdinum hava vit síðani vant okkum at liva við. Fyrst undir skiftandi norskum valdsharrum og síðani donskum. Vant okkum so væl at vit ikki vilja av við tað aftur. Hetta trælaband, sum Sigmundur bant okkum niður við, eru vit ikki enn tann dag í dag sloppnir leysir úr. Og serliga kristin tjóð – eru vit tað? Eg ivist.

Ólíka virðiligari hevði tað verið at reisti vitugu frælsishetjuni Trónda í Gøtu standmynd. Hann tapti fyrsta frælsisstríð føroyinga, og er síðani blakkaður av søguskrivarum øld eftir øld, so tað verður neyvan. Men sømuligari hevði tað verið.

# SEV hevur hall

Umboðsnevndin hjá SEV hevur góðkent roknskapin fyri 2000. Rakstrarúrslitið var eitt hall uppá 10,9 milliónir krónur, og fíggjarstøðan javnvigar við 525,2 milliónir krónur. Langfreistaða skuldin við árslok var 285,6 milliónir krónur.

Rakstrar-, fíggjar- og byggiætlanin fyri 2001 og fyri 2002 varð góðkend. Elprísirnir vera óbroyttir. Íløgurnar verða 71,4 milliónir í 2001 og 66,8 milliónir í 2002.

Ársfrágreiðing og roknskapur fyri 2000 er til taks á skrivstovuni í Havn.